MARKAMÓTSNEVNDIN

Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting 27. juni 2025

Mál viðvíkjandi borgara undir 67 ár - búpláss

Almannaverkið heitti, við skrivi dagfest 22. apríl 2025, á Markamótsnevndina um at taka støðu til markamót 3 í markamótsskjalinum viðv. § 14, stk. 2 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og § 46 í lógini um almannatrygd og tænastur

Ítøkiliga málið er um ein borgara undir 67 ár, sum ynskir at fáa búpláss. Borgarin hevur lungnasjúku og nýtir støðugt iltfløsku. Borgarin fær heimahjálp morgun, seinnapart og kvøld. Borgarin fær hjálp til persónligt reinføri og heimahjálpin setur mat fram til borgaran.

Metingin hjá Almannaverkinum er, at hesin borgarin ikki hevur tørv á einum námsfrøðiligum bútilboði. Almannaverkið er av tí fatan, at viðkomandi hoyrir undir ábyrgdarøkið hjá eldraøkinum og ikki landinum. Tey vísa á, at prognosan hjá borgaranum, sambært læknaváttan frá mars 2025, er vánalig og restlivið tíð hjá borgaranum er avmarkað. Eisini vísa tey á tilmælið um palliatión frá 2019, har greitt verður frá, at servitanin innan palliatión er á sjúkrahúsinum og í primera heilsugeiranum, hjá kommunulækna, heimatænastu og ellis- og røktarheimum.

Kommunala samstarvið á staðnum hevur sent viðmerkingar til málið. Tey vísa á, at visitator hevur verið og vitja borgaran í mars 2025 og metti visitator, at umstøðurnar hjá borgaranum vóru hóskandi og at borgarin fær nøktandi tænastu við heimahjálp og heimasjúkrarøkt. Kommunala samstarvið vísir á, at í samráð við Almannaverkið, hevur borgarin fingið umlætting í 14 dagar í eldrasambýli.

Víst verður á, at borgarin ynskir búpláss frá øðrum kommunalum samstarvi, men einki pláss er tøkt til borgaran í løtuni. Men at tey ongan trupulleika hava av at seta hann á bíðilista til eitt búpláss, tí hann skjótt verður 67 ár.

Kommunala samstarvið vísir eisini á, at mannagongdin er, at um summarið verða øll tøk pláss nýtt til stutttíðarpláss/umlætting, og skulu tey hjálpa borgaranum við meira enn heimahjálp og heimasjúkrarøkt, so má tað verða umlætting tey bjóða honum.

Viðgerð av málinum

Markamótsnevndin hevur í avgerðum frá 6. desember 2019 og 19. desember 2022 tikið avgerð um búpláss til borgarar, sum høvdu sjúku og vóru doyggjandi, tá ið teimum tørvaði búplássið. Og fer Markamótsnevndin at vísa til grundgevingarnar í hesum avgerðum og viðmerkingarnar til lógina um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Sambært § 14, stk. 1 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., hýsa røktarheim og eldrasambýli fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku. Undantakið er, at í serligum føri, kann eitt røktarheim ella eldrasambýli hýsa øðrum røktarkrevjandi persóni enn fólkapensjónistum.

Sambært serligu viðmerkingunum til § 5, stk. 4 kunnu fólk, sum eru doyggjandi, og sum ynskja at fáa eitt pláss á røktarheimi, eisini koma undir undantakið frá meginregluni í § 14, stk. 2.

Atlitið til sjálvsavgerðarrættin hjá borgaranum er eisini týdningarmikið í hesum sambandi. Og tað merkir, *at borgarin í størst møguligan mun eigur at verða hoyrdur, og hava eina ávirkan á, hvat bústaðartilboð verður sett honum í boði.*

Nevndin metir ikki, at borgarin hevur ein serstakan námsfrøðiligan tørv, ið peika móti tilboði frá Almannaverkinum undir almannalógini, og heldur ikki er upplýst, at borgarin hevur avbjóðingar ella tørv, ið kunnu leggja serliga byrðu á ella krevja serliga tilbúgving, um hann kemur á stovn undir eldrarøktini.

Og sambært upplýsingunum í málinum ynskir borgarin at fáa búpláss frá eldraøkinum og sambært læknaváttanini frá mars 2025 er borgarin doyggjandi, og er talan um mánaðir heldur enn ár.

Niðurstøða

Vísandi til omanfyristandandi og áður tiknar avgerðir metir Markamótsnevndin, at hesin borgari hoyrir undir ábyrgdarøkið hjá eldraøkinum eftir § 14, stk. 2, í løgtingslóg nr. 19 frá 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Viðfest hesari avgerð eru avgerðirnar, sum Markamótsnevndin tók 6. desember 2019 og 19. desember 2022.

Anna Dam, forkvinna

Jan Sjóstein

Katrin Danielsen